**Vivian á Rás2**
*Rás2 fer at hava samrøðu við Vivian og Hjørdis í morgunsendingini mánamorgunin*

# nótahandil á Mallorca

Vit hoyra javnan, at eisini føroyingar keypa sær íbúðir í suðurlondum. Vivian sigur, at tað er sera dýrt at keypa slíkar á Mallorca. Ein vanlig íbúð liggur um einar 4 mill. Skal tú hava eini sethús sum vit kenna tað frá Føroyum, so kostar tað einar 7-8 mill.

Tað eru eftir øllum at døma eisini aðrir føroyingar, sum búgva á Mallorca. Sjálv var Vivian um jóltíðir og vitjaði eina tilkomna kvinnu, sum hevði búð á Mallorca í meira enn 20 ár. Eisini veit hon um eina 70 ára gamla føroyska konu, sum býr í Palma.

## Føroyingar vælkomnir

Eru tað annars føroyingar, sum ynskja at vitja handilin hjá Vivian, so skulu tey bara fara til Plaza Major, sum liggur í miðbýnum í Palma. KERA handilin liggur í smølu gongugøtuni nærhendis.

-Eg skal nokk spæla føroyskan tónleik, so føroyingar, ið koma framvið, eins og tit frá Rás2 og Sosialinum, hoyra tónleikin og brúka hann sum vegvísara sigur ein fyrikomandi og væltalandi Vivian.

Vivian, sum tykist hava nógv jørn í eldinum, letur heilsa heima í Føroyum. – Vilja føroyingar síggja handilin og vitja her, so kunnu teir fara inn á heimasíðu okkara, www.kerafashion.com. Har finst adressan hjá nýggja handlinum.

## Hjørdis úr Havn

Vivan er ikki einsamøll føroyingur í nýggja handlinum. Hjørdis Klein úr Havn er eitt av starvsfólkunum. –Eg hoyrdi, at tørvur var á fólki og onkrum, sum dugdi spanskt, og eg søkti og fekk arbeiðið.

Hjørdis hevur búð í Panama í eitt ár og hevur verið í Valencia í Spania og í Mexico, har hon so hevur lært seg spanskt. Hon hevur verið í handlinum, síðani hann lat upp herfyri.

Hvussu leingi fer hon at vera her: -Alt er opið. Eg taki tað, sum tað kemur. Her er virkuliga deiligt at vera. Fólk eru opin og blíð og løtt at koma í samband við.

KERA handilin er sera snøggur. Ein Johan úr Sandavági hevur hjálpt til at innrætta og er komin sera væl frá tí heldur Hjørdis, sum vónar, at kundarnir fara at streyma til henda sera vakra og snotuliga handilin, ið avgjørt ikki stendur nakað aftanfyri aðrar flottar mótahandlar í Palma.




*Umframt Vivian starvast eisini Sue úr Onglandi og Hjørdis úr Havn í nýggja handlinum.*

*Mynd: Jan Müller*



*Skreytlutirnir hjá Tórgerð Suðuroy ganga sum heitt breyð í handilsgøtuni í Palma.*

*Mynd: Jan Müller*

